Løgtingslóg

um

heimild at taka ímóti peningaupphædd frá Novo Nordisk Fonden

§ 1. Landsstýrismanninum verður heimilað at taka ímóti 121 mió. kr. frá Novo Nordisk Fonden. Upphæddin verður brúkt í tíðarskeiðinum 1. januar 2023 til 31. desember 2032 til at fíggja rakstur og løgur í samstarvinum partanna millum um átøk innan viðgerð, tvørgeiraligt samstarv og gransking innan diabetes og endokrinologiskar sjúkur annars. Upphæddin verður útgoldin árliga, sambært avtalu millum landsstýrið og Novo Nordisk Fonden.

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Samtykt á Løgtingi hin 8. september 2022 við 23-0-1 atkvøðum.

formaður

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 8. september 2022

stjóri

LM-001/2022